## Leita eftir flogfari

Enn eina ferð fara norðmenn at vita, um teir kunnu finna flogfarið hjá tí kenda pólgranskaranum Roald Amundsen, sum hvarv í Barentshavinum fyri 80 árum síðani. Flogfarið, sum var av slagnum Latham 57, hvarv í útnyrðing úr Bjarnoynni tann 18. mai í 1928. Í flogfarinum vóru Roald Amundsen, flogskiparin Leif Dietrichson og fýra fransmenn, sum skuldu til Svalbard at leita eftir luftskipinum hjá pólgranskaranum Umberto Nobile. Norðmenn leitaðu eisini eftir flogfarinum í 2001, men noyddust at gevast orsakað av vánaligum veðri.



## Íri tingast við íslendingar

Evropatingið hevur gjørt av, at írski tinglimurin Pat Gallagher skal standa á odda fyri teirri tingnevndini, sum skal taka lut í samráðingunum millum ES og íslendsku stjórnina um limaskap í samveldinum. Tað skriva írsk bløð. Valið er kanska ikki heilt tilvildarligt, tí Paul Gallagher arbeiddi við at selja fisk, áðrenn hann fór upp í politikk. Sum skilst skal nevndin hjá Evropatinginum hava samskifti við limir í Altinginum í samráðingartíðini, men talan er ikki um beinleiðis samráðingar. Altingið hevur ikki mannað sína nevnd enn, skrivar Morgunblaðið.

# Javnaðarflokkurin farin av kós

**Vánaliga úrslitið hjá Javnaðarflokkinum í veljarakanningini hjá Fynd hevur givið floksleiðsluni nakað at hugsa um. Ideologiska kumpassin má rættast, og flokkurin má fáa betri samband aftur við veljarar sínar, heldur John Johannessen, formaður í tingbólkinum hjá flokkinum**

POLITIKKUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Tað skal eitt stórt arbeiði til at fáa Javnaðarflokkin á rætta kós aftur, heldur John Johannessen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum*

Tað hevði verið ein vanlukka fyri Javnaðarflokkin, um løgtingsval var í dag, og nýggjasta veljarakanningin hjá Fynd hevði hildið.

Javnaðarflokkurin hevði bara fingið 14,4 prosent. Til seinasta løgtingval fekk flokkurin 19,3 prosent.

- Hóast hetta bara er ein veljarakanning, kom úrslitið ikki óvart á meg, sigur John Johannessen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum. Men úrslitið kom ikki óvart á hann.

Hann heldur fleiri orsøkir vera til vánaliga úrslitið.

Tað kann skaða ein flokk at umsita eitt nú figgjarmál og heilsumál, sum Javnaðarflokkurin ger, og tað eru altíð keðilig signal at senda út, heldur John Johannessen.

### Til verka!

- Úrslitið gevur so avgjørt grund til sjálvrannsakan, og tað er eitt arbeiði, sum má fara í gongd beinanvegin, sigur hann.

Tað útgreinar hann við, at flokkurin verður noyddur at rætta ta ideologisku kumpassina og at fáa betri samband aftur við veljarar sínar. Flokkurin eigur at verða nógv meira virkin í lokalfeløgunum og í samfelagnum annars, sigur John Johannessen.

Hann heldur, at flokkurin førkaði seg til høgru við at vera hinu ferðina í ABC-samgonguni, og tí helt flokkurin tað vera rætt at fara í CHE-samgonguna fyri at kunna reka meira sosialdemokratiskan flokk. Men tann samgongan helt ikki, og tí kom flokkurin aftur í borgaraliga samgongu.

### Hørð tíð

Hetta turbulenta lívið hevur slitið nógv upp á flokkin, sum hevur brúkt tað mesta av síni orku til fundir og samráðingar, ið hava verið nátt sum dag. Orka hevur ikki verið til annað, eitt nú at gra seg meira sjónligan og at hava betri samband við fjølmiðlar.

- Vit mugu eisini ásanna, at tað ber ikki til at orða politikkin á eini skrivstovu við fjølmiðlaráðgeving og øllum tí. Sosialdemokratiskur politikkur er ein rørsla. Ávirkanin skal tí koma úr neðra upp til leiðsluna 0g ikki øvugt, sigur John Johannessen.

Hann nevnir annars, at javnaðarflokkar aðrastaðni hava verið í afturgongd. Tað tykist vera eitt rák, sum er komið eitt sindur seinni hendavegin

- Men vit mugu taka í egnan barm. Okkara arbeiði hevur ikki verið nóg gott, sigur John Johannessen, sum leggur aftrat, at arbeiðið við at koma aftur á beint so spakuliga er farið í gongd.

### Orðaskifti á Facebook

Eina løtu eftir at úrslitið frá veljarakanningini var kunngjørt, fór John Johannessen á Facebook og stovnaði ein kjakbólk fyri at fáa orðaskifti um at fáa javnaðarvirðini aftur í hásæti.

Er tað ikki eisini at standa fjart frá veljarunum og fara á Facebook við orðaskiftinun heldur enn at standa andliti til andlit við veljaran?

- Nei, als ikki. Facebook er eitt sosialt forum. Tað er rætt, at ikki allir veljarar eru á netinum, men samskiftisformarnir eru so nógv broyttir. Hetta er ein møguleiki fyri óformliga at siga sína hugsan, og eg vóni, at vit fara at fáa nøkur góð hugskot frá fólki, sigur John Johannessen, sum leggur dent á, at kjakbólkurin als ikki bara er fyri teir sannførdu javnaðarveljararnar.

# Ráðstevna um útbúgvingarsamstarv

**Hósdagin verður ráðstevna í Lærara-skúlahøllini um altjóða útbúgvingarsamstarv**

Klokkan níggju hósmorgunin byrjar ein ráðstevna, sum hildin verður í Læraraskúlahøllini í Havn. Fyrilestrarnir verða átta í tali.

Ráðstevnan snýr seg um útbúgvingarmøguleikar í øðrum londum.

Sveis til dømis er ikki limur í ES men hevur skipað útbúgvingarsamstarv við lond í ES.

Tað ber til at lesa á Fróðskaparsetrinum og samstundis taka ein part av útbúgvingini í einum øðrum landi.

Ein fyrilestur verður um altjóðagerð av evropeiskum lærustovnum. Altjóðagerð er nógv annað enn at fara í eitt annað land at lesa, tí altjóðagerðin kann eisini fremjast á heimauniversitetinum.

Eitt annað evni verður samstarvsmøguleikar í norðurlendskum og ES høpi, á vinnuútbúgvingarøkinum og í samstarvi við vinnulívið og arbeiðsmarknaðin.

Royndir eru við evropeiskum verkætlanarsamstarvi innan ser- og vaksnamannaútbúgving.

eTwinning.net er eitt elektroniskt samstarvsforum á alnótini, har lærarar og næmingar í Føroyum hava møguleika at amstarva við starvsfelagar í evropeiskum skúlum.

Ráðstevnan endar við eini workshop, sum er ætlað lærarum, samskiparum og leiðslum í fólka- og miðnámsskúlum.

Freistin at melda seg til ráðstevnuna var úti í dag.